# – Mín støða er púra greið: JA!

**– Eg haldi, at tað er ein sjálvfylgja at tvær slíkar kommunur leggja saman, sigur Sædis Eilifsdóttir í Gøtu. Fyrrapartin í gjár var hon og greiddi atkvøðu í brævi. Hon sigur greitt ja til samanlegging við Leirvík.**

FÓLKAATKVØÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Sædis Eilifsdóttir við brævatkvøðuni í hondini. – Mín støða er púra greið, sigur hon*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**GØTA:** Hóast tveir dagar enn eru til fólkaatkvøðuna hava fleiri longu verið og greitt atkvøðu.

Tað tykist nevniliga sum gøtufólk eru sera spent uppá hesa sermerktu atkvøðugreiðsluna um hvørt grannakommunurnar skulu leggjast saman í eina.

Hóast tað valdaði friður á kommunustkrivstovuni í Gøtu fyrrapartin í gjár, so er tað kortini henda atkvøðugreiðslan sum fer við nógvari tíð.

Leygardagin skulu nevniliga teir 740 veljararnir í Gøtu kommunu á val, um tey eru samd við bygdaráðnum í avgerðini um samanleggingini ella ikki.

Fleiri fólk, sum ikki vera heima valdagin, fara at greiða atkvøðu umvegis brævatkvøðu.

Ein teirra er Sædis Eilifsdóttir, sum ikki verður í Gøtu leygardagin. Tá verður hon, sum rímiligt er stødd í Tivoli í Keypmannahavn, har dóttir hennara, Eivør Pálsdótir skal hava konsert um kvøldið.

### Samstarv

Tað kunnu sjálvandi vera ymiskar hugsanir um eitt slíkt mál. Men Sædis hevur kortini eina greiða støðu:

- Eg havi atkvøtt ja, sigur hon, beint eftir at brævatkvøðan er latin formanninum í valstýrinum, Måns Persson.

Líkt er til at fleiri onnur – fyri ikki at siga flestøll – gøtufólk eru av somu hugsan sum Sædis.

Og tað skilir hon væl:

– Tað er longu nú nógv samstarv millum báðar bygdirnar. Og so liggja tær eisini so tætt at hvørji aðrari.

– So tað er tí púra natúrligt at tvær slíkar kommunur leggja saman í eina kommunu, sigur hon.

### Einasta rætta

Hósdagin í farnu viku var borgarafundur í Gøtu um hetta málið, og týskvøldið var ein líknandi fundur í Leirvík.

Men fyri Sædis hevur ongantíð verið nakar ivi um, hvat var rættast at gera:

– Eg var beinanvegin positivt sinnað fyri eini samanlegging. Tað er eisini tað einasta rætta at gera, sigur hon avgjørd.

Hon sóknar tó við, at nøkur fólk í Gøtu eru kanska ivasom í hesum máli.

– Hetta er kanska mest tey eldru. Eg trúgvi at tey ungu halda tað vera rætt at leggja saman.

– Mín støða er kortini púra greið, sigur Sædis.

# – Mín støða er púra greið: NEI!

**– Nú eru endiliga nakrar milliónir í kommunukassanum. Og so skulu vit beinanvegin leggja saman. Tað skilji eg ikki, sigur leirvíkingurin, Hegin Sevdal. Leirvíkingar tykjast meiri ivingarsamir til samanleggingina enn gøtufólk. Ein teirra er Hegin Sevdal: - Eg síggi ongan fyrimun við at leggja saman við Gøtu. Ikki ein einasta, sigur hann avgjørdur.**

FÓLKAATKVØÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Leirvíkingar fáa ongan fyrimun av samanleggingini við Gøtu, sigur Hegin Sevdal*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**LEIRVÍK:** Gjáramorgunin var Hegin staddur á Statoil-støðini í Leirvík til fyrrapartskaffi.

Eins og vanligt er slíkar fyrrapartar, er ein hópur av mannfólki í øllum aldri komin saman her.

Hetta er undirhúsið í Leirvík. Her verða tey stóru evnini tikin fram og viðgjørd. Og her sleppa allir at siga sína hugsan um dagsins mongu evni. Her er loyvt at vera ósamdur.

Men í morgun tykist semjan at vera rættiliga stór millum hesar menninar í kaffistovuni. Evnið er samanleggingin við Gøtu. Og støðan er eitt avgjørt NEI til hesa.

Tað heldur Hegin eisini. Tí sum hann sigur:

– Vit fáa ikki nakrar serligar fyrimunir av samanleggingini. Tað verður Gøta sum fær flestu fyrimunir, sigur hann.

Hinir nikka samtykkjandi. Tað verður helst so sum hann sigur. Tann størra kommunan fer helst avstað við bróðurpartinum.

### Spinkað og spart

Hegin hevur fylgt væl við í orðaskiftinum hesa seinastu tíðina. Og hansara meining er greið:

– Sært tú. Vit her í Leirvík hava spinkað og spart í nógv ár. Ja, tú kanst siga, at so nógv er vorðið spart her, at vit hava ikki havt ráð at stykkja út.

– Nú eru endiliga komnar nakrar milliónir í kassan. Og so skal ein beinanvegin leggja saman, sigur hann.

Í Gøtu eru stórar ætlanir innan vinnulív og mentan. Ætlanin er m.a. at útbyggja fótbóltsvøllin og gera eitt mentunarhús, eins og menn eru farnir undir handilsdepilin.

– Eg veit ikki. Vit hava eitt bygdarhús her í Leirvík. Hetta er eitt gott hús. Fara teir nú at byggja eitt mentunarhús í Gøtu, so fer tað at undirminera okkara hús, sigur Hegin.

Samstarvið innan skúlaverkið hevur eisini verið frammi í orðaskiftinum. Her hevur hann eisini eina greiða støðu: Ein átti at gjørt ein felags framhaldsskúla fyri allar tríggjar bygdirnar á Kambsdali.

– Har eru fleiri skúlar frammanundan, og tí átti ein at kunna savnað næmingarnar saman her longu frá 8. flokki, sigur hann.

### Allar tríggjar

Skulu kommunur leggja saman er neyðugt at tær kunnu og duga at samstarva.

Hann hevur hoyrt bygdaráðslimir og onnur siga, at fuglfirðingar snøgt sagt vildu ikki við í samstarvið. Hetta varð eisini nevnt á borgarafundinum í Leirvík.

– Men eg havi tvørturímóti skilt, at Sigurd borgarstjóri í Fuglafirði nettupp hevur sagt, at hann er positivur fyri at allar kommunurnar løgdu saman.

– Persónliga hevði mær tí dámt best, um allar tríggjar bygdirnar í økinum løgdu saman í eina stóra kommunu. Hetta áttu tær allar at lagt seg eftir, sigur Hegin.

Hann er sannførdur um, at nógvir fyrimunir høvdu verið við hesum bygdunum, sum á henda hátt og reint geografiskt høvdu kunnað verðið ein virkin tríhyrningur.

– Hetta hevði eisini gagnað samstarvinum. Við trimum kommunum saman hevði verið neyðugt at funnið fram til semjur og loysnir sum allar kundu góðtaka.

– Hetta, trúgvi eg, hevði verðið til gagns fyri okkum øll!